

## Fremad Amager vann

Andrew av Fløtum og liðfelagarnir í Fremad Amager vunnu venjingardystin, sum teir spældu leygardagin. Dysturin var ímóti 2. deildarliðnum Holbæk, og Fremad Amager vann 2-0. Tíðliga í dystinum var tað Kenny Thorup, sum skoraði, og í seinna í fyrra hálvleiki økti Søren von Essen til 2-0. Fremad Amager gjørdi nógvar útskiftingar í hálvleikinum, og einki mál kom afturat í seinna hálvleiki.

## Italskur fótbóltur avlýstur

Italskur fótbóltur var í fríggjadagin raktur av einum sorgarleiki, tá ein løgreglumaður varð dripin í saman-brestum millum áskoðarar hjá Seriu A liðunum Catania og Palermo. Italska fótbóltssambandi tók avleiðingina og avlýsti allan fótbólt í teimum báðu bestu deildunum um vikuskiftið. Tikið verður seinni støða til, hvussu leingi bannið fyri at spæla fótbólt verður galdandi. Avlýsingin merkir, at toppdysturin millum Roma og Inter eisini verður útskotin.

KÍF-StÍF 21-20 (16-10):

# KÍF blandar seg í oddastríðið

**KÍF førdi trygt í fyrra hálvleiki, tá teir tóku ímóti StÍF í Atlantic Airways deildini. Í seinna hálvleiki kom tó rættiligur spenningur í dystin, men kollfirðingarnir megnaðu at halda fast**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍF hevði sunnudagin veruliga møguleikan at gera um seg í oddinum. Vunnu teir heimadystin móti StÍF, so vóru teir ájavnir strandingum og Kyndilsmonnum í stríðið um at fáa seinna plássið í FM-finaluni.



*KÍF hevur lagt seg undir liðina á StÍF og Kyndli á øðrum plássi, eftir at teir vunnu ein sera tættan og spennandi dyst ímóti júst StÍF sunnudagin.*
*Mynd: Álvur*

### KÍF fekk flúgvandi byrjan

Heimaliðið úr Kollafirði fekk eina flúgvandi byrjan, har teir serliga í verjupartinum tóktust at hava sera gott tak á strandingum. Í álopspartinum var spælið ikki altíð so flótandi, men fyrstu løtuna megnaðu teir tó at vinna seg nakað fram við StÍF.

Eftir 10 minuttir hevði KÍF lagt seg á odda við trimum málum, men so noyddist Damir Oros hjá Damir Oros av vøllinum við skaða í fótliðinum, og so mátti KÍF vera hann fyri uttan í restini av dystinum.

Eftir hetta kom StÍF heldur betri við í dystin í eina løtu. Teir fingu betur tak á verjuni, men álopið haltaði tó enn eitt sindur hjá teimum. Næstu løtuna kláraðu teir tó at minka um munin, soleiðis at bert tvey mál vóru á muni, tá tað restaðu 10 minuttir av fyrra hálvleiki.

Kollfirðingarnir tóktust tó ikki serliga nervaðir av at hava mist stórskjúttan í fyrra hálvleiki. Teir blivu bara við at kempa, og síðstu løtuna gav hetta úrslit. Hesa løtuna fangaðu teir fleiri bóltar frá StÍF, og so revsaðu teir mistøkini hjá strandingum við skjótum mótálopum.

### StÍF var ikki at kenna aftur

Tá liðini komu út til seinna hálvleik var týðiligt, at StÍF hevði funnið út av, hvønn veg tað bar. Hvat Jakob Jónssin hevur sagt við teir í hálvleikinum, er ilt at meta um, men teir komu út til seinna hálvleik sum eitt satt ódnarveður.

Serliga í verjuni høvdu teir funnið út av, hvussu teir skuldu steðga KÍF, og nú sást týðiliga, at saknurin í Damir Oros var stórur. StÍF fór langt út at verja Daniel Rapa frá fyrsta bríksli í seinna hálvleiki, og hetta tóktist geva KÍF stórar trupulleikur. Teir komu ikki ígjøgnum verjuna, og so blivu teir ravsaðir í hium endanum, har StÍF við skjótum og góðum spæli fekk hol á KÍF verjuna.

Tá 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, vóru nú aftur bert tvey mál á muni, og nú var líkt til, at StÍF fór at fáa KÍF aftur.

Næstu løtuna fingu kollfirðingar tó rætta uppá verjuna, soleiðis at liðini nú næstan ikki fingu mál næstu 10 minuttirnar. Hesa løtuna komu bert trý mál. Eitt til KÍF og tvey til StÍF.

Hesir blivu óvanliga dramatiskir. StÍF royndi at fáa kÍF aftur, men hvørja ferð strandingar skoraðu, so svaraði KÍF aftur. KÍF bleiv eisini rakt av fýra útvísingum hesa løtuna, men kortini megnaði StÍF ikki at koma uppá javnt. Í fleiri umførum blakaðu teir bóltar vekk, og hetta kom at kosta teimum dýrt. Tá hálvurannar minuttur var eftir, minkaði Finnur Hansson um munin niður í eitt mál, og eftir hetta hevði KÍF fleiri møguleikar at avgera dystin, meðan strandingar fleiri ferðir kundu komið uppá javnt. Har kom tó einki mál afturat í dystinum, og sostatt vann KÍF, hóst teir bert fingu fimm mál í seinna hálvleiki.

### Týdningarmikil sigur

Eftir dystin millum KÍF og StÍF fingu vit orðið á strikuspælaran hjá KÍF, Gert Hansen. Hann var ótrúliga glaður fyri sigurin.

- Hesin sigurin hevði ótrúliga stóran týdning. Vunnu vit ikki dystin, so hevði munurin verið heldur stórur upp til tey bæði oddaliðini, men eftir sigurin eru vit nú javnir við bæði StÍF og Kyndil, so nú kann alt henda. Vit fáa ávísar trupulleikar, tá vit missa Damir í dag, men eg haldi, at verjan og kanska serliga Óla Kristian skaffa okkum bæði stigini í dag. Álopið koyrdi slett ikki í seinna hálvleiki, men við eini slíkari verju kunnu vit røkka langt.

**FAKTA**

**KÍF-StÍF 21-20 (16-10)**
**Málskjúttar:**
**KÍF:** Daniel Rapa 8 (2), Gert Hansen 6, Rógvi Weyhe 3, Teitur Joensen 1, Damir Oros 1, Ingi Johannesen 1, Eddie Joensen 1
**StÍF:** Jakob Jónsson 8, Finnur Hansson 8 (5), Jørmund Joensen 2, Andre Danielsen 1, Leivur Justinusen 1
**Brotskøst:** KÍF 2, StÍF 6
**Útvísingar:** KÍF 7, StÍF 3
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

Stjørnan-StÍF 26-19 (12-8)

# Stjørnan vant seg ígongd

**Stjørnan hevði ikki stórvegis trupulleikar, tá tær hildu fast um oddasessin við sigri á StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

StÍF hevði trupla uppgávu, tá tær vóru á vitjan á hjá Stjørnuni sunnudagin. Oddaliðið úr Klaksvík hevður kanska havt nakað sveiggjandi avrik í ár, men lítil ivi er millum hondbóltskøn um, at tær hava sterkasta liðið í landinum.

Júst móti StÍF hevur Stjørnan tó ofta havt sínar trupulleikar, og eina løtu høvdu gestirnir eisini hug at arga sunnudagin.

Stjørnan byrjaði nevnliga betri, men so stóð púrasta fast í langa løtu, og tað høvið nýtti StÍF til at skjóta fimm mál á rað. Eitt timeout frá Stjørnubeinkinum fekk ikki alt fyri eitt skil á spælið, men spakuliga byrjaði tó at ganga rætta vegin. Og eftir steðgin varð ivin ruddaður burtur. Stjørnan byrjaði sum eitt ólægi, og áðrenn StÍF veruliga hevði vent sær, stóð 17-10 á talvuni.

Og tann munin helt Stjørnan so eisini um restina av tíðini. StÍF megnaði ikki at hótta nakað stórvegis aftur, og so mundu tankarnir hjá teimum reyðu spakuliga fara at leita fram móti steypafinaluni, sum er næsta málið á leiðini í ár.

**FAKTA**

**Stjørnan-StÍF 26-19 (12-8)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 7, Bára S. Klakstein 6, Louisa Andreasen 5, Hanna Mikkelsen 4, Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 1, Maria við Neyst 1
**StÍF:** Ninna K. Johansen 14(3), Malan Petersen 1, Rósa Johansen 1, Sólfríð Christiansen 1, Fríðrun Danielsen 1, Ata Gregersen 1
**Brotskøst:** StÍF 3
**Útvísingar:** Stjørnan 2, StÍF 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen